FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 7. juni 2021
J. nr.: 21/09882

Svar uppá fyrispurning nr. 52-153/2020 frá Beini Johannesen, løgtingsmanni, settur, Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um tinglýsingargjald.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv hevði tað kostað landskassanum at lækka tinglýsingargjaldið frá 1% til 0,5%?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at lækka tinglýsingargjaldið?

Svar:
At lækka gjaldið úr 1% niður í 0,5% kostar áleið 25 mió.kr. árliga. Inntøkurnar fyri tinglýsingargjaldið vóru 51 mió. kr. í 2020.

Núverandi samgonga, sum var í minniluta í fíggjarnevndini seinasta valskeið, mælti í tilmælinum úr fíggjarnevndini frá at hækka tinglýsingargjaldið. Samgongan hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at lækka tinglýsingargjaldið aftur. Tað ætli eg mær at virka fyri.

Tinganes, 7. juni 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum